Fylgiskjal 1:

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	Løgtingslógaruppskotið
§ 8 c. Húsalánsgrunnurin kann harafturat, eftir teimum treytum, ið ásettar eru í § 8 b, stk. 1-5, fíggja bústaðabygging upp til 450 mió. kr.	**§ 8 c.** Húsalánsgrunnurin kann harafturat, eftir teimum treytum, ið ásettar eru í § 8 b, stk. 1-5, fíggja bústaðabygging upp til 450 mió. kr.
Stk. 2. Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið saman við øðrum íleggjarum, sbr. tó stk. 4. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um staðseting og málbólk til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.	*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. 200 mió. kr. skulu fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin tekur, í samráð við Húsalánsgrunnin, avgerð um staðseting og avmarking av málbólkum til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.
Stk. 3. Tá Húsalánsgrunnurin saman við íleggjarum fer undir verkætlanir á vanliga bústaðamarknaðinum, skal grunnurin virka undir somu treytum sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum.	*Stk. 3.* Húsalánsgrunnurin kann fíggja verkætlanir sambært stk. 2, 1. punktum saman við øðrum íleggjarum, og skal grunnurin, tá um slíkar verkætlanir ræður, virka undir somu treytum, sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum.
Stk. 4. Hóast ásetingina í stk. 2, 1. pkt., kann landsstýrismaðurin loyva Húsalánsgrunninum at fara undir verkætlanir einsamallur, um ongin áhugi er hjá íleggjarum at verða við í verkætlanini ella trupult er at fáa semju við íleggjarar.	*Stk. 4.* Strikað.